Fylgiskjal 8

LM-045/2023

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

Løgmálaráðið
Gongin 7
Postrúm 64
110 Tórshavn

27. september, 2023

Hoyringarsvar frá Fróðskaparsetri Føroya til løgtingslóg um broyting í revsilógini viðv. kynsligari avnoyðslu og lokking

Fróðskaparsetur Føroya
University of the Faroe Islands

J.C. Svabos gøta 14
Postrúm 272
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel. +298 352 500
Fax +298 352 501

setur@setur.fo

www.setur.fo

Landsstýrismaðurin í lógarmálum hevur sent Fróðskaparsetri Føroya uppskot til hoyringar til løgtingslóg um broyting í revsilógini viðv. kynsligari avnoyðslu og lokking. Hoyringsfreistin er 27. september 2023.

Løgfrøðingarnir á Søgu- og samfelagdeildini hava viðgjørt lógaruppskotið.

Tikið verður undir við, at nýggjar revsiásetingar verða settar inn í føroysku revsilógina, har hesar eru neyðugar, fyri at taka atlit til atburð, sum serliga er vorðin møguligur í seinastuni knýtt at menning av elektroniskum samskifti.

Fróðskaparsetrið dugir kortini í løtuni ikki at meta um, hvørt sjálvstøðugar ásetingar um avnoyðslu og lokking gera nyttu samanborið við longu galdandi ásetingar. Tí skal ikki sigast nógv um tann innihaldsliga partin.

Kortini skulu nakrar viðmerkingar gerast til hugburðin til revsirættarpolitikk, sum liggur undir lógaruppskotinum.

Fyrst er at nevna, at tað liggur ein ov einføld tiltrúgv aftan fyri lógaruppskotið um, at sjálvstøðugar ásetingar um avnoyðslu og lokking eru neyðugar og fara at betra um rættarstøðuna. Í hvussu er verður lítið og onki gjørt við at viðgera hetta sjálvstøðugt. Ein einføld fortreyt tykist verða tikin fyri givið, nevniliga at føroyska lógin má spegla ta til eina og hvørja tíð galdandi donsku lógina. Hetta verður gjørt uttan at koma inn á kjakið og viðgerðina, sum leiddi til donsku lógarbroytingarnar.

Viðvikjandi lokking (grooming) er veruleikin, at danskir myndugleikar og serkøn leingi hildu tað vera óneyðugt við sjálvstøðugari áseting um hesi viðurskifti, tí mett varð, at serliga greinarnar um neyðtøku (216, stk. 2), revsing av samlegu við barn undir 15 ár (222, stk. 1) og barnaporno (greinarnar 226 og 235) longu heimilaðu nøktandi revsing fyri flestu støður, sum kundu íkoma, eisini umvegis internetið.

Kortini skal ikki avvísast, at ein sjálvstøðug føroysk áseting um lokking kann hava virði. Hetta krevur kortini eina sjálvstøðuga viðgerð, men ongin slík liggur aftanfyri lógaruppskotið, ella er í hvussu er ikki endurgivin í viðmerkingunum.

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

Eisini verður undir endamálinum við lógaruppskotinum sagt, at hóast lokking og kynslig avnoyðsla í ávísum førum kann revsast sambært øðrum ásetingum í revsilógini, so kann prógvbyrðan verða torfør at lyfta. Víðari verður sagt, at uppskotið skal tryggja, at tað í størri mun skal bera til at døma fyri kynsliga avnoyðslu og fyri lokking. Ikki er vist, at hetta er ætlað so, men orðingin gevur ta fatan, at prógvbyrðan er ein praktisk avbjóðing hjá ákæruvaldinum, har lóggevarin síðan við hesi broyting kann koma til hjálpar, so prógvbyrðan ikki gerst ein forðing fyri í størri mun at kunna fella dómar. Revsirættarpolitikkur má vera um annað og meira enn at fella fleiri og harðari dómar. Hartil er stranga prógvbyrðan í revsimálum ein hornasteinur í vesturlendskari rættarmentan, og henda eigur ikki lættliga at linkast fyri at fremja einstakar revsilógarbroytingar.

Lógaruppskotið er, sum flestu broytingar aftan á yvirtøkuna av revsirættinum, merkt av fráveru av egnum føroyskum revsirættarpolitikki og revsipolitiskum kjaki. Lóggivið verður út frá einum grunsli um, at talan er um at fáa tað gjørt "rætt" eisini í Føroyum, sum danski lóggevarin longu hevur gjørt í Danmark. Talan er ikki um lóg grundað á egnan revsirættarpolitikk, men, sambært málbrúkinum í uppskotinum sjálvum, um "dagføringar", við donsku lógini sum vegvísara. Í so máta var ongin orsøk til at hava eina serføroyska revsilóg.

Eisini skal vísast á, at tað er ein óskikkur ov lættliga at vísa til ítøkilig mál í sambandi við revsilógarbroytingar. Ikki so, einstøk mál kunnu avdúka manglar av generellum áhuga. Ítøkiliga málið, ið almennu viðmerkingarnar vísa til sum grundgeving fyri uppskotinum, er kortini ikki eitt slíkt. Onki er, sum bendir á, at verandi lógarásetingar ikki longu áðrenn fyriliggjandi uppskot á nøktandi gjørdu tey brot revsiverd, sum eru komin fram í tí málinum.

Tann skundur, málið tykist at hava – bæði sambært almennu viðmerkingunum og almennari fráboðan í summar um framskundan av lógarbroytingini um avnoyðslu og lokking – og hetta, at lógaruppskotið hevur hoyringarfreist, áðrenn málið skal leggjast fyri revsirættarráðið, boðar frá eini politiskari instrumentalisering av revisrættinum. Við hetta meinast, at revsirættarbroytingar, har tað er ringt at siga, hvør, um nøkur, nytta ella vinningur er, og sum áttu at fingið eina gjølliga fakliga viðgerð, verða gjørd til politisk markeringsmál, sum um tað er eitt lætt og einfalt samband millum einstakar revsilógarbroytingar og mótvirkan av revsiverdum atburði.

Vegna Fróðskaparsetur Føroya

Johan Ísak Suni Hansen, fyrisitingarstjóri